


Í Landsmiðstøðini er eitt starv sum skrivstovufólk leyst at seta frá 1. januar 2009 ella skjótast til ber.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um móttøku og avgreiðslu av viðskiftafólki, útlán av undirvísingarmiðlum, røkt av bókasøvnum og ymiskt praktiskt arbeiði í sambandi við skeiðsvirksemi. Starvið kann eisini fevna um bókhald og avgreiðslu um FSL-skipanina hjá Føroya Gjaldstovu.

Vit sóknast eftir fólki, sum hevur

- skrivstovuútbúgving/royndir við skrivstovuarbeiði
- viðkomandi arbeiðsroyndir, eitt nú frá bókasavni
- viðkomandi kunnleika og arbeiðsroyndir við bókhaldi
- førleika og áhuga í at nýta teldu í arbeiðinum.

Lýkur tú øll ella nøkur av førleikakrøvunum omanfyri, dámar tær at abeiða sjálvstøðugt, ert tú røkin og tænastuhugað/-ur, hevur tú góð samstarvsevni og hevur tú lætt við at samskifta við fólk, er tað helst teg okkum tørvar.

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv í einum stovni, sum hevur samskifti við flestu skúlar og lærarar í landinum, og sum hevur samstarv við eitt nú Mentamálaráðið, Landsbókasavnið og Føroya Gjaldstovu.

Talan er um starv í fulla tíð. Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Simonsen, stjóra í Landsmiðstøðini, tlf. 356850 ella 220414 ella um teldupostadressuna peturs@lms.fo.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving, starvsroyndir v.m. skulu vera Landsmiðstøðini í hendi í seinasta lagi hósdagin 13. november 2008.

**Landsmiðstøðin**
Hoyviksvegur 72 • Postrúm 3084
FO-110 Tórshavn
www.lms.fo • lms@lms.fo

www.lms.fo Landsmiðstøðin

**Landsmiðstøðin** er stovnur undir Mentamálaráðnum, sum veitir tænastur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, veitir fakliga og námsliga ráðgeving, skipar fyri eftirútbúgving av lærarum og hevur námsligan verkstað.

# Koyrikort?

Teoriskeið til persónbil byrjar **mikudagin 12. nov. kl. 17.00**

Teoriskeið til lastbil, buss og trailara byrjar **mikudagin 12. nov. kl. 19.30**

**Driver's Education Course**
Classes in theorie
**Thursday 13. nov. at 6 pm**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI
John A. Christiansen tel 21 47 75
Rúni Christiansen tel 21 4765

**Vallalíð 3 - Tórshavn**

# Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tanntekniskari

## Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480

## Sethús til sølu í Norðragøtu

Vídd 160 m² í einum plani.
Byggiár 2002.
Húsini eru stoypt upp, vindeygu og hurðar eru úr timburi, taki svart alumineum við tøttum tróðuri.
**Rúm:** Gongd, baðirúm, 2 barnakømur, køkur, grovkøkur, stova og hjúnarrúm við atgongd til vesi gjøgnum skápsgongd.
Bilhús vídd 28 m² leyst frá húsunum.

**Ring tel 442120 ella 227173**

IRF
*– heilt og reint*

# Rusksavnari til Rósu

Søkt verður eftir einum rusksavnara til innsavningarbilin Rósu at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðið umfatar:**

- innsavning av húsarhalds- og virkisposum
- annað fyrifallandi arbeiði

**Vit ynskja ein innsavnara, sum**

- hevur stóra koyrikortið, og er vanur at koyra lastbil
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- er kundavinaligur og álítandi

Løn sambært fastlønarsáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 13. november 2008

Nærri fæst at vit um starvið við at ringja til 414243, Jógvan Júst Olsen

**IRF**
Postboks 39
520 Leirvík

IRF hevur fýra innsavningarbilar til húsarhaldsposar. Tríggir mans eru við hvørjum bili. Roði, Rósa og Ryski heinta húsarhaldsposar í øllum meginøkinum.

Altjóða Skrivstovan
International Office

# TOEFL-roynd

## fríggjadagin 23. januar 2009

(Test of English as a Foreign Language)

Møguleiki er aftur at taka sonevndu TOEFL iBT-royndina í Føroyum.

TOEFL-royndin er ofta upptøkukrav á hægri lærustovnum í ensktmæltum londum.

Royndin verður fríggjadagin 23. januar 2009 kl. 10 á Fróðskaparsetri Føroya, Nóatúni 3.

Tilmeldingarfreistin hjá TOEFL er í seinasta lagi 8 dagar undan royndini, men mælt verður til at melda seg til í góðari tíð vegna avmarkað pláss hjá okkum.

Tilmelding fer fram on-line á: www.ets.org/toefl

Kostnaðurin er 155 USD.

**Altjóða Skrivstovuna**
tlf. 322065
ask@ask.fo
www.ask.fo

**Fróðskaparsetur Føroya**
tlf. 352500
setur@setur.fo
www.setur.fo



## Vágs skúli

# Frá valnevndini fyri Vágs skúla

**Til skúlastýrisvalið 11. november eru hesi valevnið uppstillað:**

Anna Brattaberg Samuelsen, Vágur
Egill Steintórsson, Vágur
Conrad G. Joensen, Vágur
Arni Johansen,Vágur
Majken Sandá, Vágur

**Vegna valnevndina**
Óli í Hjøllum, skúlastjóri

# Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við